# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðfeingisdeildina G1

Søkt verður eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi til fast starv á G1 á starvsbrøki 0,8 at byrja 1. mars 2008 ella eftir avtalu.

Eisini verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingum til farloyvisstørv, starvsbrøkur eftir avtalu.

**Deildin umfatar**
- skaðastovu
- bráðfeingis móttøku
- intensiv
- viðrakning

Deildin er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum, sum í høvuðsheitum umfatar røkt og viðgerð til sjúklingar á skaðastovuni, í bráðfeingis móttøkuni, intensivar sjúklingar (5 seingjarpláss) og sjúklingar í viðrakning (5 seingjarpláss). Starvssetti kemur eftir tørvi at hava fleiri ymiskar arbeiðsuppgávur.

**Vit kunnu bjóða**
- góða innleiðslu
- skipaða upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar

**Krøv til umsøkjararnar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í viðgerð og røkt av sjúklingum við bráðfeingis tørvi
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- opin og positiv/ur
- vil søkja mennandi avbjóðingar
- má kunna arbeiða í skiftandi vaktum, dag-, kvøld- og náttarvaktum

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- fakligar royndir at viðgera og røkta sjúklingar við bráðfeingis tørvi
- minst 2 ára royndir á medisinskari og/ella kirurgiskari seingjardeild
- intensiva eftirútbúgving

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja 304500 til

- Margit Stórá, deildarleiðara á G1, lokal 5811, lsmarst@ls.fo ella til

- Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, lsnaitu@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 12. februar 2008**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn

## Feriuavloysarar fyri bioanalytikarar

Í tíðarskeiðnum 1. mai 2008 til og við 30. september 2008 eru nøkur avloysarastørv leys at søkja. Størvini kunnu verða alt tíðarskeiðið ella í styttri tíð, um áhugi er fyri tí.

**Rannsóknarstovan umfatar**
- kliniska biokemi
- kliniska immunologi
- kliniska mikrobiologi
- kliniska fysiologi
- patologi

Blóðroyndir verða tiknar úti á bygd eina ferð um vikuna.

**Førleikakrøv**
- bioanalytitikaraútbúgving
- góð samstarvsevni
- fleksibilitetur

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna við vaktskyldu (vakt frá heiminum).

Nærri upplýsingar fáast við at ringja 304500 til Ivy Hansen, leiðandi bioanalytikara, lokal 5601 ella lsivyha@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 22. februar 2008**

## Onnur størv (sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar til G4/A3**
Umsóknarfreistin er 28. jan. 2008

**Deildarleiðari til Skurðgongina**
Umsóknarfreistin er 28. jan. 2008

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Skopieindina/Skurðgongina**
Umsóknarfreistin er 28. jan. 2008

**Læknaskrivari til Skurðdepilin**
Umsóknarfreistin er 28. jan. 2008

**Leiðsluskrivari til Skurðdepilin**
Umsóknarfreistin er 29. jan. 2008

**Sjúkraflutningstænastan**
Umsóknarfreistin er 4. feb. 2008

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B8**
Umsóknarfreistin er 4. feb. 2008

**Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar til B7**
Umsóknarfreistin er 4. feb. 2008

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B6**
Umsóknarfreistin er 4. feb. 2008

**Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar til E2**
Umsóknarfreistin er 4. feb.

**Sjúkrarøktarfrøðingar til A2**
Umsóknarfreistin er 12. februar







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

